Nr. 95/2019

Steffan Klein Poulsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um Rambøll støðumetingina av tunlunum norð um fjall, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvør er niðurstøðan í støðumetingini hjá uttanhýsis serfrøðini, Rambøll av tunnlunum norð um fjall, sum bleiv gjørd í desember 2019?

2. Í hvørjum standi eru tunlarnir, og hvørji tilmæli hevur Rambøll fyri Hvannasundstunnulin og Árnafjarðartunnulin?

3. Er tað trygt og forsvarligt at koyra ígjøgnum tunlarnar norð um fjall sambært støðumetingini hjá Rambøll?

Viðmerkingar:
Tunlarnir norð um fjall vera skjótt elstu tunlarnir, sum vera brúktir í Føroyum, tá tað er koyrandi gjøgnum Hvalbiartunnilin. Árnafjarðartunnilin, sum knýtir Árnafjørð til Klaksvíkina, er frá 1965 og Hvannasundstunnilin, sum knýtir alt øki eystan Múla, t.v.s. Norðdepil, Hvannasund, Viðareiði og aðrar smáar bygdir, til Klaksvík, bleiv liðugur í 1967. Trygdin er lítil og ongin í tunlunum. Tað kemur eisini fyri at grót dettur niður inni í tunnlunum.
Í desember 2019 gjørdi Rambøll eina støðumeting av tunlunum norð um fjall. Støðumetingin frá hesari uttanhýsis serfrøði kann staðfesta, hvussu standurin er í tunnlunum. Tað hevur stóran týdning at síggja, hvør niðurstøðan er í støðumetingini hjá Rambøll, og um tað er nóg trygt at koyra gjøgnum tunnlarnar norð um fjall.

Á Løgtingi, 3. juni 2020

Steffan Klein Poulsen